# Meira **gaman** enn

**- Til 18 ára aldur klára nakrir føroyingar at standa mát við útlendskar leikarar. Men so steðgar tað. Tað er líka sum eingin menning í bestu deildini. Men tað er nú ikki bara í Føroyum, at spælarar vilja taka sær av løttum. Trúgv mær, eg veit tað av egnum royndum. Tú verður fullkomiliga býttur av frítíðini, og í so máta er tað ikki nógv øðrvísi, sigur Alexander Djordjevic, sum var liðformaður hjá Robert Prosinecki og øðrum heimsstjørnum á serbiskum ungdómslandsliðum, men ikki vildi vera náttarlívið fyri uttan**



- Eg vildi bæði, so einfalt er tað!

Alexander Djordjevic situr og flennur. Og tað hevur hann gjørt nógv í sínum higartil 40 ára gamla lívi. Hóast serbin sum ungur hevði eina sera bjarta fótbóltsframtíð, vildi hann ikki vera náttarlívið og ballingarkvøldini fyriuttan. Sama um fleiri av sínum fyrrverandi liðfeløgum á jugoslaviska ungdómslandsliðnum hava gjørt um seg í mætum feløgum sum Real Madrid, Barcelona, AC Milan og Juventus, iðrar hann ikki um tær raðfestingar, hann gjørdi. Nú situr Alexander Djordjevic í KÍ-húsinum og hyggur – nøgdur - aftur á sína yrkisleið í jugoslavisku kappingini, Avstralia og Suður Korea. Hann rakk ongantíð toppin, tí hann vildi bæði hugna sær og spæla fótbólt samstundis.

## Náttarlívið fylti nógv

Alexander Djordjevic er skrásettur fyri gott og væl 375 dystir við FK Partizan, sum verður mett sum eitt av teimum stóru fýra í serbiskum fótbólti. Sum verjuspælari var hann millum stuðulsleikararnar á liðnum í árunum frá 1986 til 1991. Hóast fótbóltsevnini frá ungum árum vóru sera eyðsýnd, stendur hann í dag í skugganum av sínum javnaldrum. Á jugoslaviska ungdómslandsliðnum var Djordjevic liðskipari og á liðnum vóru leikarar Robert Prosinecki, Zvonimir Boban, Davor Suker, Predrag Mijatovic, Vladimir Jugovic og Sinisa Mihajlovic, sum allir fingu eina gylta fótbóltsyrkisleið og royndu seg í fleiri av mætastu feløgunum í Evropa.

- Eg vil ikki siga, at eg ikki tímdi. Men eg kundi verið væl meira seriøsur. Men eg hevði og havi eitt frálíkt lív. Mær dámdi sera væl náttarlívið, og eg iðri meg ikki um nakað ballingarkvøld í dag. Og soleiðis vildi eg hava tað. Eg upplivdi ta síðuna av lívinum. Hóast eg onkutíð kom heim klokkan fimm um morgunin, so var lag á manni at fara til venjing klokkan níggju. So eg hevði ongar trupulleikar við tí sum so, greiðir Alexander Djordjevic flennandi frá.

- Men tað er so aftur tað, hvat tú vilt. Eg hevði mínar vinir og familju har, og eg spældi í einu sera sterkari landskapping, har vit stóðu okkum sera væl í Evropa. Og tað var eg nøgdur við, leggur hann afturat.

## Evnini eru har

Aleksander Djordjevic virkar í dag sum venjari hjá einaráðandi kvinnuliðnum í Klaksvík. Hann er í løtuni undir seinastu útgávuna av venjaraútbúgvingini, og hann hevur – einaferð - hug at royna seg sum venjara í útlandinum.

Hann hevur eisini arbeitt við ungdóminum í Klaksvík, og frá egnum royndum kann hann staðfesta, at føroyskir fótbóltsspælarar heilt víst hava evnini.

- Til 18 ára aldur klára nakrir føroyingar at standa mát við útlendskar leikarar. Men so steðgar tað. Tað er líka sum eingin menning í bestu deildini. Tað er ikki bara í Føroyum, at spælarar vilja taka sær av løttum. Trúgv mær, eg veit tað av egnum royndum. Tú verður fullkomiliga býttur av frítíðini. Í so máta er tað ikki nógv øðrvísi. Tú má taka ábyrgd av tær sjálvum, viðvíkjandi mati og øðrum. Skal føroyskur fótbóltur flyta seg rætta vegin, eru tað tílík smáting, sum hava stóran týdning, sum skulu rættast, sigur 40 ára gamli serbin.

## Tað krevur nógv

Hóast Alexander Djordjevic ikki valdi at fylgja dreyminum um evropeiskan toppfótbólt, er hann fullgreiður yvir, hvat tað snýr seg um. Hann var partur av

